
Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Atlantic Petroleum skal bora eftir gassi í Vøringsbrunnium

**Jógvan Hugo Gardar**

23.02.2015 - 11:50

Oljan.fo

Atlantic Petroleum kunngjørdi í morgun, í einum boðum til keypsskálan, at fyritøkan, saman við samstarvsfyritøkunum,verður við í eini boriætlan í norska Vøringsbrunninum.

Talan er um sokallava Roald Rygg-ætlanin (PL 602), og meiningin er at bora í ár. Brunnurin liggur í sama øki sum skal byggjast út sum Aasta Hansteen-ætlanin. Umframt Roald Rygg liggja fleiri aðraráhugaverdar ætlanir í økinum.

Stjórin í Atlantic Petroleum, Ben Arabo, sigur at tey eru nøgd við at vera ein partur av hesi ætlanini.

- Vit hava gjørt eina avtalu við Statoil, ið er fyriststøðufelag, at okkara partur av ætlanini skal fara úr tíggju prosentum í dag, til 7,5 prosent. Brunnurin er sera áhugaverdur og hevur møguleika at lata frá sær nógv gass í einum øki har gassútbygging er í gongd, sigur Ben Arabo.

Ognarviðurskiftini í hesum loyvinum eru hesi: Statoil (fyristøðufelag 30 prosent), Petoro (20 prosent), Centrica (10 prosent), Atlantic Petroleum (10 prosent), Rocksource(10 prosent og Wintershall (10 prosent.

Umframt Atlantic Petroleum, so kann eisini parturin hjá Rocksource broytast, um verandi samráingar um ognarviðurskiftini verða góðkend av norsku myndugleikunum.